# Størsti festivalurin nakrantíð

**Størri nýtsla av stóra pallinum og størri og betrað Silvaland til børnini eru millum lutirnar, sum festivalfyriskipararnir í Klaksvík hava lagt serligan dent á til ársins SummarFestival**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fyrireikararnir hava í ár lagt stóran dent á, at føroysku bólkarnir fáa gott pláss í skránni*

Karmarnir eru settir upp, soleiðis at talan í ár verður um størsta SummarFestivalin nakrantíð. Sær sjálvum líkt, so hava fyrireikararnir aftur í ár víðkað um konseptið, og nú tað av álvara stundar til, er tað ein sera spentur Steintór Rasmussen, sum fæst við at leggja seinastu lutirnar til rættis.

- Festivalurin í ár verður tann mest fjølbroytti og drúgvasti festivalurin, sum vit hava fyriskipað. Summar Festivalurin er ein heildarupplivilng fyri alla familjuna, og hesaferð verður tónleikur og undirhald á fýra pallum í tríggjar dagar.

- Fyri fyrstu ferð hava vit framførslur á stóra pallinum allar tríggjar dagarnar, og skráin er bæði spennandi og innbjóðandi. Silvalandið fær sín egna pall, verður betrað enn meira og hevur longri opið, so okkara smáu gestir fáa enn meira burtur úr festivalinum, sigur Steintór Rasmussen.

## Fjølbroytni

Og skráin er veruliga fjølbroytt. Eins og í fjør, so verður futtur settur í longu hóskvøldið, og síðani verður sungið, dansa og rockað trý kvøld á rað.

- Vit hava nógv spennandi á skránni í ár. Vit hava modernaðan popp frá Alphabeat, heimsstjørnan úr Spice Girls, Melanie C, fer at syngja, slagarabólkurin fram um allar aðrar, Smokie, fer at spæla til sanna fólkaveitslu, og so eru vit eisini sera fegin um at hava stóra poetin Kára P við á festivalinum fyri fyrstu ferð.

- Vit hava eisini givið føroyskum bólkum, sum standa seg herheima og í útlandinum, gott pláss í skránni, tí tað hava teir uppiborið, og fólk vilja eisini hava góðan føroyskan tónleik. The Dreams og The Ghost, sum spæla nógv í útlandinum, eru millum føroysku bólkarnar, sigur Steintór Rasmussen.

## Fegnast um undirtøkuna

Fleiri av hinum festivalunum komu í fjør í trupulleikar, og tað hevur við sær, at festival-summarið ikki verður eins rúgvusmikið í ár, sum tað hevur verið. Um tað er hetta, sum ger seg galdandi, vil Steintór Rasmussen ikki siga, men hann staðfestir, at tey lata væl at áhuganum, sum aftur í ár verður sýndur fyri SummarFestivalinum.

- Undanfarnu festivalar hava verið góðir, og vit merkja framvegis sera stóran áhuga fyri festivalinum. Vit rokna við sera nógvum fólkum í ár, og tað verður gjørt nógv burtur úr tjaldingi, bátaplássi og umstøðum hjá húsvognum, sigur hann.

HTM
HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN
htm@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

*Umsóknarfreist: mánadagin 4. august 2008.*



**ERGOTERAPEUTUR ella FYSIOTERAPEUTUR**
**til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)**

**Hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur, og uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar – ja so hava vit júst brúk fyri tær!**

Eitt av starvsfólkum okkara hevur leitað sær aðrar avbjóðingar og er tí á HTM eitt fyribilsstarv sum ráðgevandi og málsviðgerandi Ergoterapeutur, ella Fysioterapeutur, leyst at seta beinanvegin og fyribils til 31. juli 2009, við møguleika fyri føstum starvi.

Talan er um fulltíðarstarv á 40 tímar um vikuna.

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur**
- útbúgving sum ergoterapeutur ella fysioterapeutur

**Ynskiligt er at umsøkjari hevur**
- royndir frá líknandi arbeiði
- kunnleika til at arbeiða við fólki við niðursettum førleika
- kunnleika til almannalóggávuna
- evni at seta í verk fyriskipanir
- góð samstarvsevni
- góð evni at orða seg, munnliga og skrivliga
- telduførleika á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flekstíð
- tætt samstarv við starvsfelagar
- tvørfakligt samstarv
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM, á telefon 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til: Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, FO-110 Tórshavn, ella við telduposti til: htm@almannastovan.fo.

HTM er stovnur undir Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 12 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv, innan- og uttanhýsis.

KREA